# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Fríggjadagin 7. des.**
*Havnar kirkja.* kl 10.
Meinhard Bjartalíð, militer jólagudstænasta.

**Leygardagin 8. des.**
Christianskirkjan: jólahugni fyri eldri kl. 15.

**Gudstænastur 2. sunnudag í advent**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Kristine Hestbech
***Hoyvíkar kirkja***: kl. 11 Sonja Klein
***Nólsoy:*** kl 12 Sverri Steinhólm, familjugudstænasta
***Kaldbak:*** kl 12 Bjarni Bæk
***Vesturkirkjan:*** kl. 11 Hanus Simonsen altargongd
***Sandavágur:*** kl. 11 David Johannesen
***Hestur:*** kl. 12 Heri J Joensen
***Norðskála:*** kl. 12 messa Emil Olsen
***Kvívík:*** kl. 12, altargongd (skriftarmál kl. 11.50), Marjun Bæk
***Skála:*** kl. 11 (Kórið hjá Jóhan Mortensen) lestur
***Sjóvar kirkja:*** kl. 12.10 (Kórið hjá Jóhan Mortensen) lestur
***Tjørnuvík:*** kl. 12, Mogens Tilsted Christensen
***Fuglafjørður:*** kl.12, altargongd, Uni Næs
***Hellurnar:*** kl. 17, Uni Næs
***Oyndarfjørður:*** kl. 12, altargongd, Jógvan Fríðriksson
***Christianskirkjan:*** kl. 11. Magnus Brahé Jørgensen.
***Porkeri:*** kl. 12, altargongd, Jónsvein Bech.
***Tvøroyri:*** kl. 18 »Vit syngja jólini inn«
***Øravík:*** kl.11 Símun Jacobsen
***Fámjin:*** kl. 12.15 Símun Jacobsen altargongd

**Havnar kirkja mikukvøldið 5. des. kl. 20.**
Vit syngja kirkjuárið inn. Felags sálmasangur, har 60 kórsangarar syngja fyri. Orgul, trompet og violin spæla undir.
***Aftankvirra í Havnar kirkju.*** Fríggjakvøldið 7. desember kl. 21 – 23. Kl. 22. syngur Berghild Poulsen jólasangir og Herluf Lützen spælir guitar. Kl. 22.30 andakt.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 17 bøn fyri Ísrael og Býnum, kl. 18-19.45 Delli (3. til 6. fl.), kl. 20-22 Chill (7. til 10. fl.)
Hóskvøldið kl. 19 Alpha Skeið.
Leygarkvøldið kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 morgunmøti - Ása Olsen talar, kl. 11.30 Barnagudstænasta
www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Mikudag kl. 17.15 Sangvenjing - Kassia, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti - Talari: Rólant í Skorini - Evni: Jákup.
Hósdag kl. 17: Sangvenjing – Barnakórið – Gentir og dreingir 7-9 ár, kl. 20 Ungdómsmøti - Talari: Jens Meinhard Rasmussen
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans
kl. 12 Sunnudagsskúli
kl. 18 Evangeliskt møti
Mánadag kl. 12.30 Andakt
kl. 20 Kvinnumøti - Linda Hansen luttekur.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Mikudag kl. 15 Bønarløta. Andakt á Vallalíð kl. 19.
Hósdag kl. 20 Heimaforbund, við vitjan av Elsu í Garði. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Sunnudag kl. 11 Halgunarmøti. Eingin sunnudagsskúli, men familjumøti við Lusia gongu kl. 17. Kakao og bollar aftaná.
Frelsunarherurin, suppa, sápa og frelsa síðan 1865.

**Adventkirkjan**
Mikukvøldið kl. 19 skeið í Dánielsbók heldur fram. Fyrilestur v. Jens V. Danielsen.

**Livdin í Hoyvíkar skúla**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti, har fólk siga frá sínum yndissangi.
kl. 11.30 samfelagsløta
kl. 12 tilbiðjunarmøti har Jógvan talar um evnið »Frá steinhjarta til kjøthjarta« 4. partur.
Barnaansing er undir báðum møtinum.
kl. 12 sunnudagsskúli
Týskvøldið kl. 20 møti har undirvíst verður um evnið »Andalig búninig«
www.livdin.fo

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdagin 6. des. kl. 20 Bíbliutími við Niels J. Nielsen, trúboðara – Gal. 2.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti við Christian Joensen.
Sunnudagin kl. 15 Jólafest fyri børn 0-7 ár.
Kl. 17.00 Jólafest fyri børn 8 ár og eldri.
Kl. 18.00 Einki møti vegna jólafestirnar.
Mánadagin 10. des. kl. 20 Sjómanskvinnuringurin kemur saman.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Hósdagin kl. 7 bønarmøti, kl. 20 ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 7 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 16 Jólaveitsla hjá sunnudagsskúlanum.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12
Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni, kl. 18 Møti v/ Tórur Thomsen.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mikudagin kl. 17.15 venur barnakórið.
Fríggjakvøldið kl. 19 MiniSalt hevur jólhugna.
Sunnudagin kl. 16 jólaveitslan hjá sunnudagsskúlanum.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
http://www.gospel.fo

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Mikukvøldið kl. 19.30 venur kórið.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v. Alfred Petersen, evni: Eftirfylgjan.
Sunnudagin kl. 15 Jólafest fyri børn undir skúlaaldur.
Sunnudagin kl. 18 Jólafest fyri børn í skúlaaldri.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti - Oasubrøðurnir syngja, Hjalgrim Davidsen og Tummas Juul Askham tala. Aftaná møti verður ábit og drekka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sandavágs Meinigheitshús**
Mikukvøldið 5.12.07 kl. 18.30 verður jólahugni fyri børnum í skúlaaldri.
Leygarkvøldið 8.12.07 kl. 19 verður jólahugni fyri ung.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Miðvágs missiónshús**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mikukvøldið kl. 19.30. Mint verður á pakkarnar. Streingjakórið verður við. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia Vágar, Miðvágur.**
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti saman við børnunum, jólaklipp og annað.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Hósdagin 6/12, barnaarbeiðið hevur jólafest í Saron, kl. 19.
Leygardagin 8/12, Syngja til jólatræið á torginum, kl. 16.
Sunnudagin 9/12, onki møti.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bønarløta hóskvøldið kl. 19.30.
Sunnudagin verður Adventshugni í Ítróttarhøllini kl. 15, har øll eru hjartaliga vælkomin.
Eingin sunnudagsskúli og einki møti verður sunnudagin.

**Hvalvíkar Missiónshús**
Jólahald verður sunnudagin kl. 16.00. Byrjað verður við familjugudstænastu í kirkjuni, eisini verður Luciagongd. Aftaná verður farið í missiónshúsið, har vit dansa um jólatræið og fáa kaffi, kakao, bollar og rísalamande, jólamaðurin kemur eisini á vitjan við pakkum til børnini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron Haldórsvík**
Hósdagin 6/12 húsmøti hjá Kirstin og Eirik Samuelsen kl. 20. Ver hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikumorgun 5. des. kl. 6 Bønarløta. Kl. 20 Bíbiltími – Evnið: hvat sigur bíblian um einglar og illar andar? v/ Torleif Johannesen
Hósdagin kl. 20 Bønarløta.
Fríggjadagin kl. 21 Ungdómsmøti – Praise.
Sunnudagin kl. 17 Missiónshúsið bjóðar børnum í- og undir skúlaaldur til jóla hugna saman við foreldrum.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Karmel, Eiði**
Møti sunnudagin avlýst vegna ljósmessu og konsert í kirkjuni.

**Aglow Eysturoy**
Jólamøti verður í Kelduni í Skálafirði fríggjakvøldið 7. desember kl. 20. Talarar: Lív og Dánial á Dul Jacobsen
Lovsangur: úr Kelduni
Børn frammføra við ljóðførum. Byrja verður við náttverða. Kvinnur og menn í øllum aldri verið hjartaliga valkomin!:)

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Hjørdis H. Petersen.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Berøa, Saltangará**
Mikudagin 5.12.2007 kl. 19.30 Bønar og uppbyggingarmøti.

**Lívsins Orð**
Mikukvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 18 Tim5.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

**Missiónshúsið á Toftum**
Eldrasamkoma verður fríggjadagin 7. des. kl. 16.
Øll eru vælkomin!

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagin kl. 20 Bíbiltími – Evnið: hvat sigur bíblian um einglar og illar andar? v/ Torleif Johannesen.
Hósdagur 6. des. kl. 20 Bønarløta. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Jørundur Hansen, trúboðari í Grønlandi, talar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Mikudagin 5. nov.
Skeið: Við Hirðans Føtur.
Hanus Simonsen talar.

**Getsemane, á Brekku 19**
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti. Simona & Maiken Bringsberg syngja og tala.
Leygarmorgun kl. 10 morgunbøn.
Sunnudagin kl. 18 møti, barnamøti (sunnudagsskúli) er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.
Jólaveitslan verður leygardagin 15. des. kl. 20.
Tekningarlisti hongur í Getsemane.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøld kl. 20 hugnakvøld fyri ung.
Hóskvøld kl. 20 ungdómsmøti
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Fríðtór Debes.
Mánakvøld kl. 20 bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin 5. des. kl. 20 bíbliutími Op. 3, 7-13. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**MIssiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti.
Mikudagin kl. 20 bíbliutími Op. 3, 14-22. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hósdagin kl. 20 Streingjakóri
Fríggjamorgun kl. 9.30 Orðið á borði, fyri menn.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 17 verður jólahugni.

**Ørkin, Reykjavík**
Møtini vera hvønn sunnudag kl. 17.00 á Ørkini!

**Føroysk møti í Danmark**
Esbjerg: Fríggjakvøldið 7. des. kl. 19.30 í Sædding center Evangel. møti.
Sønderborg: Leygarkvøldið 8. des. kl. 19 evangel. møti og sunnumorgun kl. 10 breyðbróting í Skolehjemmet, Søndre Landevej 28.
Vejle: 9. des. kl. 16 breyðbróting, kl. 17 Evangel. møti í hølunum hjá Frelsens Hær, Staldgårdsgade 4.
Á øllum møtunum luttaka Pól Johan Djurhuus, Robert á Lakjuni og M. C. Restorff v/ fleiri. Aftaná øll møtini bjóða vit drýl við kjøti og rullupylsu og mangt annað gott.
Hjartaliga vælkomin at hoyra orð Harrans á móðurmálinum.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*tlf. 316491 · fax 316481*
*Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Mikudagur 5. des.***
9.00 - 12.00 Maskinbinding v/Maritu Guttesen
10.00 - 12.00 Veving v/ Joanu Bjarnastein
10.00 - 12.00 Bindiklubbur
Øll eru hjartaliga vælkomin
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Sigrid Dalsgaard
12.00 Jólaborð
Minnist til pakkan til pakkaspælið
15.00 Túrur við ella uttan stavar. Argir – við ánna út eftir Reynagøtu
Randi/Elisabeth, fysioterapeutar
***Hósdagur 6. des.***
10.00 – 10.30 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
***Fríggjadagur 7. des.***
10.00 - 13.30 Fyrireiking til jólaborð
12.00 Jólaborð
Minnist til pakkan til pakkaspælið
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**90 ár**
Hósdagin 6. des. verður John Lassen Klaksvík 90 ár. Dagurin verður hildin á Klaksvíkar sjómansheimi frá kl. 18.00

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 11. desember 2007 hava Tóra og Benn Johannessen, Toftir silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima á Lýðarsvegi 16 frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sunnudagin 30. desember kunnu hjúnini Ann Arnadóttir og Hjørleif Dahl, Norðskála, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Eydnuni á Oyrarbakka leygardagin 29. desember kl. 13-17. Tey, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 422353 ella 222403 innan 7. desember.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 28. des. kl. 16.00 giftast í Vágs kirkju Búi Dahl, Vágur og Karina Viderø Jensen, Vágur. Tey, ið vilja heilsa upp á brúðarparið eru hjartaliga vælkomin í Stóra Pakkhús, Vágur, frá kl. 19.00.

Leygardagin 29. desember kl. 16 giftast í Sumbiar Kirkju, Beinta Lisberg, Sumba og Rógvi Joensen, Oyri. Veitslan verður í VB-Húsinum kl. 18. Tey sum vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 581193 (Beinta), +45 21783141 (Rógvi), 370529 (Sumba), 422208 (Oyri), innan leygardagin 8. desember.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 29. des. hava hjúnini Ebba og Kristian Isaksen, Klaksvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Skálanum kl. 18. Tey ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinaliga biðin um at siga frá á tlf. 456276 ella 227266 í seinasta lagi 19. des.